# Heimleysur í Føroyum

*56 ára gamli Martin Eliassen úr Klaksvík býr á gøtuni í Havn. Hann passar ikki inn í føroyska samfelagið. Hvørki kommunan í Klaksvík ella Almannastovan kunnu hjálpa honum við at finna bústað. – Eg eri verjuleysur í eini sosialari skipan, sum ikki virkar fyri mítt viðkomandi, sigur Martin Eliassen*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD OG EYÐUN KLAKSTEIN

Ritan kemur inn móti Skansaboga av øðrum túrinum í morgun, og ættin er skeiv á Skansanum í Havn. Hon er ongantíð til vildar hjá tí, sum hevur Skansan sum sítt heim á náttartíð í Havn.

Her er altíð trekkur, sjálvt um tú liggur í le. Og ein av teimum, sum av og á svevur á Skansanum, er 56 ára gamli Martin Eliassen úr Klaksvík.

Hann er heimleysur

–Tá hann er lágur í ættini, plagi eg at liggja her, sigur Martin og peikar á ein bonk á norðaru síðu á Skansanum. Beint sunnanfyri nýggja fyrisitingarbygningin hjá Føroya Sparikassa – gamla Fiskasølubygningin. Hesin er júst settur í stand fyri 53 milliónir og í gjár var móttøka í bygninginum, har sjálvur mergurin í føroyska samfelagnum savnaðist. Kransakøkurnar, sum lupu av, liggja enn og storkna og torna í rustíløtunum hjá Sparikassanum.

– Tá hann er høgur í ættini, fari eg suður um, sigur Martin, sum er meinkunnigur á Skansanum. Hann fer ígjøgnum eina tronga smogu í verndargarðinum, og vit koma útaftur hinumegin og síggja beint niður yvir havnalagið á Eystaru bryggju.

– Eg plagi at liggja á hesum beinkinum, nei, hann er horvin, teir hava tikið song hjá mær, sigur Martin undrandi.

– Tú svevur ikki væl úti, vaknar ofta og undrast, hví tú endaði soleiðis í lívinum, sigur Martin Eliassen, sum er útbúgvin fysioterapeutur og hevur sæð betri dagar.

## Eingin hjálp

Martin er ein av okkara borgarum, sum hevur ilt við at passa inn í samfelagið við teimum krøvum, sum samfelagið setir til tann einstaka. Í dag eru allar dyr stongdar. Hann er heimleysur hóast, hann eigur pening til at leiga eina íbúð, tí ongin vil hava hann at búgva hjá sær.

Martin vil helst búgva í Klaksvík, men her hevur kommunan givið upp. Hon klárar ikki at hjálpa einum borgara, um hann er sum Martin.

Tá sosialu myndugleikarnir i Klaksvík hava givið upp, er Martin vorðin eitt landsproblem, og hann kennir seg burturvístur til Havnar. Men Almannastovan fær heldur ikki hjálpt honum, og tí býr Martin á einum bonki á Skansanum í Havn, har gamlir fangar spøkja og rustaðar kanónir minna um orrustur í farnum døgum.

Umgyrdur av ein ríkum vælferðarsamfelag skelvir Martin so tenninar ringla í munninum, meðan náttin spakuliga viknar meira og meira.

## Almannastovan fær einki gjørt

Martin Eliassen hevur seinastu tvey árini livað uttan at vita, hvar hann skal sova komandi náttina.



*Martin Eliassen hevur seinastu tvey árini livað uttan at vita, hvar hann skal sova komandi náttina. Er veðrið gott, yvirnáttar hann undir opnum himni, men er illsligt í veðrinum, noyðist hann at leita sær skjól hjá Frelsunarherinum. Men tað er eingin varandi loysn og verður bara nýtt í neyðstøðu. Mynd: Álvur Haraldsen*

Er veðrið gott, yvirnáttar hann undir opnum himni, men er illsligt í veðrinum, noyðist hann at leita sær skjól hjá Frelsunarherinum. Men tað er eingin varandi loysn og verður bara nýtt í neyðstøðu.

– Eg havi eisini rikist á øllum gistingarhúsunum, sum eru í Tórshavnar kommunu, men nú vilja hesi gistingarhús ikki hava meg innaftur, tí hotellini ikki skulu brúkast sum bústaður, sigur Martin.



*– Tá hann er høgur í ættini, fari eg suður um, sigur Martin, sum er meinkunnigur á Skansanum. Mynd: Álvur Haraldsen*

Hann hevur roynt at fingið Almannstovuna at finna sær eina íbúð, men heldur ikki tað hevur borið til. Týsdagin fekk hann skriv frá Almannastovuni, sum sigur, at Almannastovan ikki kann hjálpa honum við bústaðartrupulleikunum, tí hon hevur ikki hús ella íbúð at vísa á.

– Tað einasta Almannastovan kann gera, er at vísa á tann privata íbúðarmarknaðin, verður sagt í skrivinum.

Og har ber ikki til at finna nakað.

– Eg havi roynt alt, sum eg kann, fyri at finna mær okkurt at búgva í, men eg fái einki, sigur Martin Eliassen, sum hevur verið í sambandi við nógvar politikarar fyri at fáa hjálp – men uttan úrslit.

## Vil helst búgva í Klaksvík

Martin Eliassen hevur búð størsta partin av lívi sínum í Klaksvík, og har starvaðist hann eisini. Men fyri fleiri árum síðani flutti hann til Havnar, og seinastu tvey árini hevur ongan fastan bústað havt.

– Eg havi búð størsta partin av mínum lívi í Klaksvík, og tað er eisini har, eg helst vil búgva. Men heldur ikki har kann eg fáa innivist nakrastaðni, sigur hann.

Martin hevði hús saman við konu síni, men tá tey vórðu skild, vórðu húsini seld. Síðani leigaði hann í Klaksvík, men endin var, at hann stóð uttan bústað.

– Eg kendi meg noyddan at fara til Havnar, og tað er ikki av góðum vilja, at eg eri her. Eg vil sleppa aftur til Klaksvíkar at búgva, tí tað er har eg kenni meg heima, sigur hann.

Í Havn hevur hann møguleikan at yvirnátta í herberginum hjá Frelsunarherinum av og á, men einki líknandi stað er í Klaksvík.

## Dagar á gøtuni

Á herberginum hjá Frelsunarherinum kann Martin Eliassen leita sær skjól, men har er ikki opið um dagin. Fólk sleppa inn klokkan 10 á kvøldi og fara út aftur klokkan 10 á morgni.

– Tí má eg ganga og mæla allan dagin í Havnini. Eg plagi at fara á bókasavnið at lesa bløðini, men har ber ikki til at verða sitandi fyri dagin. Onkuntíð eri eg á farstøðini ella koyri eg eina løtu í einum býbussi, greiðir Martin Eliassen frá.

– Eg eri illa gongdur og somuleiðis sjúkur, so tað er sera trupult hjá mær at skula verða allan dagin á gøtuni. Eg kann ikki leggja meg á nakran bonk, tí so kemur løgreglan og sigur, at eg má ikki sova á einum bonki í býnum.

– Tað er heldur ikki ófarligt at ganga fyri seg sjálvan at kalla verjuleysur, og eg var niðursligin fyri kortum. Eg eri illa fyri, og fái tí einki gjørt fyri at verja meg, sigur Martin.

## Roynir nú Kærustovnin

Í vikuni hevur Martin Eliassen sent Føroya Kærustovni skriv, har biður um eina prinsipiella avgerð um hansara bústaðartrupulleikar.

– Kommunan, haðani eg komi, sigur seg ikki hava nakra ábyrgd av, um eg havi ein bústað ella ikki, og Almannstovan kann ikki hjálpa mær. Eg eri tí verjuleysur í eini sosialari skipan, sum ikki virkar fyri mítt viðkomandi, sigur Martin Eliassen í skrivinum til Kærustovnin.

– Veturin stendur fyri durðum og okkurt má henda í hesum máli, sigur Martin, sum biður um eina hjálpandi hond frá Kærustovninum.

Ein hjálpandi hond, sum er at finna nógvastaðni, men sum enn ikki hevur ført til, at hann hevur fingið varandi bústað.



# Innrás av Shell-bilum

*Tangabilar hjá Shell vóru hósdagin í Klaksvík eftir bensini, tí Magn hevur havt brek við skrúvuni*



*Tangabilar hjá Shell noyddust hósdagin í Klaksvík eftir bensini til bensinstøðirnar í Havn og Eysturoy*

EYÐUN KLAKSTEIN

**Klaksvík:** Shell-tangabilar úr høvuðsstaðnum og Eysturoy gjørdu innrás í Klaksvík hósdagin. Orsøkin til hetta var, at tangaskipið, Magn, hevur havt brek við skrúvuni, og tí ikki kundi sigla sum vanligt hesa vikuna.

Fyri at tryggja at nóg mikið av bensini var á sølustøðunum í Havn og Eysturoy, fóru bilar hjá Shell til Klaksvíkar, har ivaleyst av bensini var á goymslu.

Shell-bilarnir fyltu tangarnar og fóru so um Leirvíksfjørð við Dúgvuni í døgurðatímanum hósdagin. Bensin kann ikki flytast saman við ferðafólki, og tí var neyðugt hjá Shell at leiga Dúgvuna um middagsleitið. Tá liggur strandfaraskipið vanligt ein góðan tíma í Klaksvík.

## Lættasta loysnin

- Magn er longu farin aftur at sigla sum vanligt, og kemur alt í rættlag aftur nú, sigur Hákun Djurhuus, stjóri á Føroya Shell.

Hann sigur, at um Magn hevði verið noyddur at ligið í longri tíð, hevði Shell leigað annað skip til flutningin av brennievni, men brekið varð umvælt eftir stuttari tíð, og so var lættasta og bíligasta loysnin at flyta bensin úr Klaksvík til sølustøðini í Eysturoy og í Havn.

- Við at flyta bensin á hendan hátt hava vit tryggja okkum, at allar bensinsølurnar hjá okkum hava nóg mikið av bensini til Magn kemur aftur til landið. Brúkararnir má jú fáa ta vøruna, sum hann hevur brúk fyri, sigur Hákun Djurhuus.

# Aria í TB-húsinum

**Tvøroyri:** Leygarkvøldið fer poppbólkurin Aria úr Klaksvík at spæla til dans í TB-húsinum.

Aria hevur spælt til dans ymstastaðni í summar, og nú eru tað suðuroyingar, sum standa fyri tørni. Aria er á hvørjum ári í Suðuroy, har verða teir vanliga væl móttiknir.

Aria fer at spæla løg hjá sær sjálvum og hjá øðrum.



# Vatngoymslurnar fullar aftur

*Nú er nóg mikið av vatni í báðum vatngoymslunum í Klaksvík*

**Klaksvík:** Nú eru vatnviðurskiftini í Klaksvík við at koma í rættlag aftur. Seinastu dagarnar hevur verið vátt í veðrinum, og tað hevur gjørt, at báðar goymslurnar hjá Klaksvíkar kommunu eru fullar aftur.

Fyrr í vikuni varð stongt fyri vatninum um náttina til vestara arm fyri at tryggja, at nóg mikið av vatni var um dagin. Hetta er tó ikki neyðugt longur.

Goymslan í Ánagjógv, sum letur vatn til øll virkini í Klaksvík umframt til eystara arm hevur ongantíð verið stongd, og tann goymslan er eisini full nú. Hendan goymslan fær í løtuni vatn úr Svartadali og onkrum keldum, og er tað ikki nóg mikið, er nógv vatn í Strandadali at taka av.

Goymslan í Ánagjógv tekur 1800 tons av vatni, meðan brunnarnir á Horni samanlagt taka 2400 tons.

**ek**


AEROBIC SPINNING OG BALLETT

NÚ BYRJA VIT AFTUR

**Yndi** *kann bjóða øllum okkurt slag av kropsvenjing. Kvinnum sum monnum, ungum sum eldri, stórum sum smáum, sterkum sum veikum.*

Byrjað verður mánadagin 28. august og halda vit á til 03. desember

SPINNING

Sum nakað spinnandi nýtt kunnu vit nú bjóða tímar í SPINNING, sum seinastu árini er vorðin sera vælumtókt víða um. SPINNING er sera gott fyri ♥, lungu og blóðrenslið. SPINNING er sera konditiónsstimbrandi og ein ógvuliga góður háttur at klænka seg. SPINNING kann íðkast av øllum, eisini teimum við veikum liðum ella ryggi.

*Tíðirnar eru:*

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 18:15 – 19:05 Spinning *Byrjarar* | 16:00 – 16:50 Spinning *Byrjarar* | 18:30 – 19:30 Spinning *Vand* | 19:30 – 20:20 Spinning *Byrjarar* |
| | 20:00 – 21:00 Spinning *Vand* | | 20:30 – 21:30 Spinning *Vand* |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

| | | Skúlanæmingar |
|---|---|---|
| 1 ferð um vikuna: | 490 kr. | 20% avsláttur |
| 2 ferðir um vikuna: | 790 kr. | 20% avsláttur |
| 3 ferðir um vikuna: | 1050 kr. | |

Vigar tú ov nógv? ....Her er kjansurin!

Trimma & Spinn

FEITTKNÚSARI

Sum nakað nýtt bjóða vit teimum, ið viga meiri enn 10 kilo ov nógv, venjing tvær ferðir um vikuna. Byrjað verður við styrkivenjingum fyri búk, rygg, enda, armar og bein. Síðani verður farið at spinna, har tað serliga er blóðrenslið og feittbrenningin, ið dentur verður lagdur á.

*Tíðirnar eru:*

| Mánadag | Mikudag |
|---|---|
| 19:30 - 20:00 Trimm | 19:30- 20:00 Trimm |
| 20:00 - 21:00 Spinn | 20:00 - 21:00 Spinn |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

1050,- kr.

AEROBIC

Trimmari – Aerobic – Steppbonkur – Venjing uttan hopp – Mix – Menn

*Tíðirnar eru:*

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|
| 17:15 - 18:15 Aerobic *Byrjarar* | 15:00 - 16:00 Trimmari *Øll* | 17:15 – 18:15 *Kvinnur* Uttan hopp | 17:15 – 18:15 Aerobic *Byrjarar* | 15:00 – 16:30 Mix |
| 18:15 - 19:30 Aerobic *Vand* | 19:00 – 20:00 Trimmari *Øll* | 18:15 – 19:30 Cirkulvenjing *Øll* | 18:15 - 19:30 Aerobic *Vand* | |
| 20:00 - 21:00 *Menn* | 20:00 - 21:00 Steppbonkur | | 19:30 – 20:30 Trimmari *Øll* | |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

| | 60 min. | 75 min. | Skúlanæmingar |
|---|---|---|---|
| 1 ferð um vikuna : | 490 kr. | 610 kr. | 20 % avsláttur |
| 2 ferðir um vikuna: | 790 kr. | 990 kr. | 20 % avsláttur |
| 3 ferðir um vikuna: | 1050 kr. | 1310 kr. | |

BALLETT

Byrjað verður mánadagin 28. august og halda vit á til 03. desember

*Tíðirnar verða hesar:*

| Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|
| 16:00 - 17:00 *9-10 ár* | 16:00 – 17:00 *11-12 ár* | 16:00 – 17:00 *13 ár og eldri* |
| 17:00 - 18:00 *6-8 ár* | | |
| 18:00 - 19:00 Dansur *Vaksin* | | |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

6-12 ár: 375 kr.
13 ár og eldri: 490 kr.

Ringið ella komið yvir í YNDI leygardagin 26. august millum kl. 15:00 og 17:00 ella møti bara til tíman.

Fá meira at vita hjá **Yndi**, kom framvið og fá tær ein faldara og eitt prát. Møguligt er at fáa ókeypis royndartíma í SPINNING og AEROBIC. Møguleiki er hjá feløgum, fyritøkum o.ø. at leiga tímar í **Yndi**.

Tilmelding verður í Yndi, Yviri við Strond 21, leygardagin tann 26. august frá kl. 15.00 til kl. 17.00

Komið inn á gólvið ella ringið á tel.: 311 311, 310 025 ella 312 868.



YNDI v/ Elsu Mariu Bærentsen

Yviri við Strond 21
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 311 311
Fax: 318 527
e-mail: yndi@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820